


## Nýtt Phelps-met

Amerikanski Michael Phelps setti fyri fimtu ferð heimsmett í 200 metra blandaðari svimjing, tá hann um vikuskiftið tók lut í Grand Prix kapping í Missouri. Phelps svamt teinin í tíðini 1.53,71. Til sammetingar kann nevast, at FM-metið hjá Kristiani M. Johansen á teininum er 2.12,19.

## Mortan til La Manga

Pauli G. Hansen hjá Skála hevur givið avboð til venjignarleguna hjá fótbóltslandsliðnum á La Manga. Í hansara stað hevur Jógvan Martin Olsen tikið Mortan úr Hørg við í hópin. Mortan vann sær sætið í hópinum seinastu dystirnar, tá Henrik Larsen var landsliðsvenjari, men undir Jógvani Martin Olsen hevur pláss hansara langt í frá verið eins víst. Landsliðið fer av landinum tann 24. februar.

StÍF-VÍF 29-36 (15-18):

# Hesa ferð riggaði

**Strandingar komu ongan tíð upp á finaluhæddirnar, tá VÍF staðfesti oddastøðu sína í landskappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var kanska væntandi, at VÍF var liðið við betru tendringini á Skála sunnudagin. Eftir tapið í steypafinaluni, har vestmenningar mest sum tveittu sær sigurin burtur, skuldi bletturin vaskast á Skála, og tað varð hann eisini so ruddiliga.

VÍF var nevnliga á odda allan dystin á tamb. Fyrstu fimm minuttirnar sendu teir fimm bóltar inn um Marian Cirloganescu, og tó at StÍF kom seg eftir timburmenninar frá finaluni, so tóktust teir ikki hava tað, sum skuldi til fyri at venda dystinum.




*Hesa ferð eydnaðist hjá VÍF at basa strandingum. Kanska ein fátøk troyst eftir finalutapið, men kortini ein sigur, sum mest sum vissaði VÍF sæti í FM-finaluni*

*Mynd: Álvur*

### Mistu ikki høvdið

Fremsta orsøkin til hetta var helst, at vestmenningar ikki í sama mun lótu seg stressa. Í finaluni mistu teir at kalla tamarhaldið á sær sjálvum – og harvið dystinum – men tann støðan íkom ongan tíð sunnudagin.

Við 10 minuttum eftir tóktust strandingarnir annars at hava bíta frá sær. Munurin varð minkaður í tvey mál, men tá Marian fekk tveir minuttir, tá hann fyri aðru ferð í dystinum varð skotin í andlitið, kundu vestmenningar punktera dystin. Teir skoraðu tvær ferðir á rað í yvirtalil, og so varð seinasta vónin hjá vertunum sløkt.

### Finaluklárir

Sigurin ber við sær, at Vestmenningar nú eru mest sum finaluklárir. Kravið í so máta er fýra stig í komandi fýra dystunum, og tað man vera til at liva við hjá einum somikið royndum liði. Hartil skal havast í huga, at tað als ikki er víst, at KÍF, StÍF ella Neistin fáa fulla úrtøku seinastu fýra umførini.

Tí er fremsta avbjóðingin hjá VÍF kanska at halda spælarunum til, soleiðis at teir ikki »sovna« seinastu umførini.

Tann vandin er helst eisini ítøkiligur hjá StÍF. Tí hóast ein FM-finala í sjálvum sær skuldi verið nóg stórt agn, so hava vit fleiri ferðir áður sæð, at liðið er vorðið ov nøgt eftir ein steypasigur. Og at avgerandi stig í landskappingini tí eru tveitt burtur í umførunum kring finaluna. Eitt fyribrigdi, sum StÍF ikki hevur ráð til hesaferð.

### FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-VÍF 29-36 (15-18)**
Málskjúttar
**StÍF:** Finnur Hansson 8(3), Leivur Justinussen 5(1), Bent Djurhuus 3, Mortan Hansen 3, Sveinur Justinussen 2, Bárðru Danielsen 2, Jacob Jónsson 1
**VÍF:** Áki Olsen 7, Regin Joensen 7(3), Agnar Joensen 6, Sámal Joensen 5, Ingi Olsen 4, Harald Bjørgvin 3, Áki G. Olsen 2, Sjúrður Poulsen 2
**Brotskøst:** StÍF 7, VÍF 3
**Útvísingar:** StÍF 3, VÍF 5
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

Kyndil-VB 20-29 (11-13):

# VB dusaði sær í Havn

**Kyndil spruttaði fyrstu løtuna, men fyrstu løtuna eftir steðgin avgjørdu gestirnir dystin**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kyndil hevur enn møguleikan at vinna seg fram til eina FM-hálvfinalu, og fyrstu løtuna av dystinum sunnudagin tóktust tær eisini spæla fyri hesum møguleikanum.

VB hevði sera ilt við at koma ígongd, og kanska sat harði dysturin móti Neistanum framvegis í beinunum fyrstu løtuna.

Í øllum føurm formáddu tær sær at kalla einki móti einum Kyndils-liði, sum hevði lætt spæl í tíggju minuttir ella so. Glið kom tó á, og seinastu 20 minuttirnar undan steðginum lagaði VB sær grund undir sigrinum. Í verjupartinum mest sum stongdu tær fyri Kyndli, sum í 20 minuttir bara fekk fýra mál afturat. Og í løtuni eftir steðgin, skrædnaði av álvara. Áðrenn Kyndil varnaðist nakað sum helst, stóð 12-22 á talvuni, og so var eingin sum helst ivi um, hvar stigini skuldu. Talan kundi enntá verið um enn meira trivaligan sigur, men seinastu 5-6 minuttirnar fekk heimaliðið loyvi at pynta nakað um úrslitið.



*Tað var sjáldan, at Kyndil megnaði at hótta VB, tá suðuroyarkvinnurnar vitjaðu í Havn sunnudagin*

*Mynd: Álvur*

### FAKTA UM DYSTIN

**Kyndil-VB 20-29 (11-13)**
Málskjúttar
**Kyndil:** Ronja Mikkelsen 5(2), Randi Wardum 4(1), Anja Heinadóttir 3, Lina Andriulyte 2, Jacklyn Durhuus 2, Bjørg Syderbø 2, Ragnhild á Plógv 2
**VB:** Laila Jespersen 5, Svava Vestergaard 5, Ivana Ljubicic 4(2), Maja Sølvsten 4, Theresa Joensen 3, Asta Armonaviciute 2, Una Egilsdóttir 2
**Brotskøst:** Kyndil 6, VB 2
**Útvísingar:** Kyndil 1, VB 1
**Dómarar:** Kristian Johansen & Kári Hansen